Fylgiskjal 6

Sofus Clemmensen | Krimsvej 5C, 2 th. | 2300 København S | Mobil: + 45 2969 0169

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 Tórshavn

Keypmannahavn tann 3. mai 2018

## Viðmerking til sølutilgongdina av Pf. Postverk Føroya

Tá eg í síni tíð var stjóri á Pf. Postverk Føroya, var eg m.a. upptikin av, hvussu postala virksemið í framtíðini kundi gerast meiningsfult fyri føroyska samfelagið, tí longu tá var innlýsandi, at brøv og filateli fóru at hvørva.

Eitt tað týdningarmesta málið eg tá arbeiddi við, var at loysa strukturellu handilsforðingina millum útheimin og Føroyar, ið m.a. stends av ov vánaligari atgongd til altjóða nethandilin vegna avmarkaðari atgongd til nethandlar, ov dýrum flutningskostnaði og ikki minst ov dýrum tollavgreiðslukostnaði.

Grundað á hagtøl og flutingstøl, ið tá vóru til taks bæði í Føroyum og í grannalondunum, gjørdi eg ymiskar útrokningar og samanberingar. Hesar kanningar góvu ábendingar um, at føroyingar í mun til íbúgvar í grannalondunum innflyta lutfalsliga fleiri vørur uttanum føroysku MVG skipanina eitt nú í samband við uttanlandsferðir (*da. grænsehandel – fø. marknahandil*). Somu útrokningar vístu eisini, at ein partvís og realistisk øking í nethandilinum til Føroya fór at økja um MVG inntøkurnar til føroyska landskassan við **uml. 50 mió. kr.** árliga.

Eg gjørdi tí eitt uppskot til, hvussu partar av marknahandilinum kundu konverterast til nethandil og harvið økja um MVG inntøkurnar hjá landskassanum. Uppskotið innihelt útgreining av, hvussu atgongdin til altjóða nethandilin kundi betrast fyri allar føroyingar, og hvussu flutnings- og tollavgreiðslukostnaðurin kundi avmarkast. Uppskotið varð hugsað sum eitt samfelagsmál og ikki sum eitt virkismál, tí talan er um eina strukturella forðing, ið bert landið fær loyst.

Tað sum eg tá skeyt upp, var at stovna eitt nýhugsað føroyskt flutningskervi til nethandil, sum bæði vinnan og borgarin høvdu lætta atgongd til. Talan var um eitt sonevnt BtC (Business to Consumer) flutningskervi, ið hevði sum høvuðsendamál at virka fyri føroyska samfelagið við at avmarka flutnings- og tollavgreiðslukostnaðin fyri BtC flutning og harvið at økja um MVG inntøkurnar hjá landskassanum – umframt at føroyska handilsvinnan fekk møguleika at menna seg í tráð við menningina innan altóða nethandilin.

Eg legði uppskotið við ymisku útrokningunum og samanberingunum fyri táverandi vinnumálaráðharra, Johan Dahl, og tilfarið, ið eg sendi Johan, eigur at vera til skjals í

Sofus Clemmensen | Krimsvej 5C, 2 th. | 2300 København S | Mobil: + 45 2969 0169

skjalagoymsluni hjá UVMR. Johan viðgjørdi í stuttum uppskotið við táverandi aðalstjóran í fíggjarmálaráðnum, men tá var tíðin ikki búgvin til at gera meira við málið.

Ein lítil heimamarknaður við avmarkaðum vøruútboði og avmarkaðari kapping ger, at Føroyar eru meira disponeraðar fyri marknahandli enn størri lond, ið hava ein størri heimamarknað og størri kapping. Undir vanligum umstøðum átti hetta at merkt ein stóran BtC flutning til Føroya, men so er ikki. Tí flutningstøl vísa, at føroyski BtC flutningurin er lutfalsliga nógv minni enn tilsvarandi BtC flutningurin í Evropa, og eru tað greið tekin um, at nethandil hevur sera trong kor í Føroyum. Óvanliga lítli føroyski BtC flutningurin gevur harumframt ábending um ein lutfalsliga stóran marknahandli millum útheimin og Føroyar.

Stóru spurningarnir eru so, hvussu stórur marknahandilin millum útheimin og Føroyar í veruleikanum er, og ikki minst hvat trongu korini innan nethandil kosta føroyska landskassanum í mistum MVG inntøkum. Tí landskassin missir stórar MVG upphæddir, so leingi tað loysir seg so væl hjá føroyingum at bíleggja og keypa vørur á uttanlandsferðum, ið ómakaleyst kunnu takast við í viðførinum til Føroya, uttan at landskassin fær ágóðan av MVG'num.

Heimsumfatandi postala flutningskervið er bygt til BtC flutning, og er harvið sera væl egnað til flutning av vørum keyptar á netinum. Nethandil er tað mest innlýsandi vakstrarøkið innan postalu vinnuna, og tí sæst eisini, at postfeløg kring allan heim vaksa um sítt virksemi innan nethandil. Strukturella handilsforðingin millum útheimin og Føroyar ger tó, at Posta ikki fær ment sítt virksemi á sama hátt innan hetta økið. Og strukturella handilsforðingin verður ikki loyst við at Posta fer á privatar hendur – heldur tvørtirímóti.

Eitt nýhugsað føroyskt BtC flutningskervi til nethandil, ið loysir strukturellu handilsforðingina millum útheimin og Føroyar, vil ikki bert geva føroyska landskassanum fleiri inntøkur – men vil eisini tæna bæði vinnu og húsarhald í Føroyum. Um landið sær tað sum sína uppgávu, at viðvirka til at skapa nøktandi tænastustøði innan nethandil, eigur landið at taka spurningurin um strukturellu handilsforðingina upp til viðgerðar og lýsa málið nágreiniliga, innan partabrøvini í Pf. Postverk Føroya verða seld.

Annars haldi eg, at sølutilgongdin av Pf. Postverk Føroya er skilagóð.

Vinarliga

Sofus Clemmensen